gult24 cyan24 magenta24 svart24



NSÍ-B68:

# Toftamenn í nýggjari útgávu

**Men hóast landsliðsmenninir á miðvøllinum á útivølli megnaðu rættuliga at kroysta NSÍ, so fekst ikki meiri enn eitt stig burturúr**

*Eftir tríggjar ferðir 90 minuttir eydnaðist tað loksins Arnold Joensen at vinna stig saman við nýggju liðfeløgunum,og spurningurin tykist nú vera, um B68 hevur fingið ferð á*

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



Tað var heilt sjónskt, at talan var um grannaupgerð við Løkin í Runvík í góðveðrinum Dýra biðjudag. Nærdystirnir vóru nógvir, men tað var á ongan hátt ófantaligt. Longu spørkini vóru mong, men tey vóru ikki altíð so neyv, og tað vil við øðrum orðum siga, at tað ikki altíð var so polerað fótbóltsspæl. Men tað var tætt, tað var spennandi, og tískil stóðu áskoðararnir sum á nálum.allar 90 minuttirnar í góðveðrinum.

Úrslitið var 1–1, og tað mundi kennast sum ein størri lætti hjá teimum á heimaliðnum og teirra viðhaldsfólkum, tá Oddmar Andreasen brírkslaði fyri síðstu ferð. Tí sjálvt um NSÍ kom á odda miðskeiðis í 1. hálvleiki, tá Christian Høgni Jacobsen gjørdi nyttu burturúr klossutum brotssparki, sum B68 málverjin gjørdi uttarlaga í brotsteiginum ímóti Sonna L. Petersen, ið elti flatan rennibólt, so vóru tað gestirnir, ið stórar partar av tíðini høvdu leikliga yvirvág. Serliga síðstu løtuna, tá teir á heimaliðnum bara vóru tíggju – Kári Hansen hevði tvær ferðir sæð gula kortið og harvið varð hann rikin av vøllinum – var bólturin støðugt á NSÍ hálvuni.

### Aftur á rætta lagið

B68 javnaði til 1–1 tveir minuttir undan hvíldini. Jákup Eli Olsen, sum í B68 leikskránni til VB dystin varð sagdur at hava sett fótbóltsskógvarnar á hillina, var íðin og nærlagdur vinstri vongverji. Í uppspælinum til útjavnandi málið, var tað hann, sum spældi Øssur Hansen, sum sendi víðari til Fróða Benjaminsen. Landsliðsmaðurin sneiddi framvið einum, áðrenn hann stakk fram ímillum eitt sindur tøvandi NSÍ miðverjuna, og Súni Fríði Johannesen var púra kaldur, tá hann lyfti upp um Jens Martin Knudsen, sum var komin langt út í brotsteigin og gjørdi seg breiðan.

Í upptaktini søgdu vit, at toftamenn í síðstu viku høvdu vaskað talvuna reina, eftir at teir einki stig høvdu fingið burturúr teimum báðu fyrstu umførunum. Í Runavík vóru teir farnir aftur til 4–4–2 útgangsstøðuna, sum teir vóru í fyrstu umførunum í steypakappingini. Jan C. Dam var sera væl upplagdur í miðverjuni, og á miðvøllinum nýtti Øssur Hansen sínar royndir, og Fróði Benjaminsen vísti hugburð, sum tað er langt síðani.

Stórtalentið Jann Ingi Petersen royndi at spæla, inntil hann varð tikin út, og í høgru royndi Arnold Joensen aftur og aftur at bjóða seg til. At B68 bara eina ferð fekk mál vóru tað tríggjar orsøkir til: Jens Martin Knudsen er ein stórur styrkur at hava fingið hjá NSÍ. B68 menninir vóru óhepnir í 1. hálvleiki, tá teir tvær ferðir sendu í tvørtræið, og hóast toppskjúttin í fjør, Súni Fríði Johannesen, skoraði sítt fyrsta mál í ár, so er tað framvegis ein veruleiki, og tað av natúrligum orsøkum, at B68 álopið ikki enn hevur nátt tað støði, sum tað hevði í fjør.

### Hava størri møguleikar

NSÍ eigur fleiri góðar bóltsspælarar. Ein teirra er Sjúrður Jacobsen, sum var ytstur í vinstra verjuborði. Fleiri ferðir bjóðaði hann seg til í álopspartinum, og tað var avgjørt mest vandamikið, tá NSÍ royndi at byggja upp í vinstru. Ein annar góður bóltspælari hjá NSÍ er Ian Højgaard. Hann plagar at trívast best sum framrættaður miðvallari. Ímóti B68 var hann ytstur á miðvøllinum í høgru. Ytsti verjuspælarin hjá NSÍ í høgru var Arnfinn Langgaard. Hann hevur størri virði sum stríðsmaður enn sum bóltspælari, og fyri evnini hjá Ian Højgaard var tað spell, at hann ikki hevði møguleikar fyri meiri samanspæli í borðinum.

Heilt eyðsýnt og merkisvert var tað, at tveir av bestu bóltspælarunum hjá NSÍ – Gert Langgaard og Brynjolvur Nielsen – ikki komu á vøllin fyrrenn seinna umfarið var væl liðið. Hugburðurin tóktist vera, at tað ráddi meiri um at hava ein miðvøll, sum megnaði at stríðast, enn at lata bóltsspælarar kappast við royndu og góðu bóltspælararnar á B68 miðvøllinum.

Christian Høgni Jacobsen hevur fleiri ferðir prógvað, at hann telist ímillum fremstu álopsspælararnar í landinum. Sonni L. Petersen er eisini væl fyri, men tað var heilt sjáldan, at teir báðir fingu bóltar at arbeiða við, sum teir uttan nakað hóvasták kundu arbeiða víðari við.

Tað eydnaðist NSÍ at fáa javnleik, men tað eiga teir ikki at vera nøgdir við, um teir ætla sær at vera við í heiðursmerkjastríðnum. Fyri B68 eigur tað at vera í lagi at javnleik í Runavík, men í skugganum av soltnu úrtøkuni í tveimum teimum fyrstu umførunum er tað ikki undarlig, um teir iðra seg um, at tað ikki eydnaðist at fáa alt, tí teir høvdu møguleikarnar til tað.

**NSÍ-B681-1 (1-1)**
1-0: Christian Høgni Jacobsen (br.) 26
1-1: Súni Fríði Johannesen 44

Dómari: Oddmar Andreasen (HB)

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Arnfinn Langgaard, Kári Hansen, Djóni N. Joensen, Sjúrður Jacobsen – Ian Højgaard, Dánial Hansen, Elian Hansen, Eddie Mikkelsen – Sonni L. Petersen, Christian Høgni Jacobsen
**B68:** Magnus Poulsen – Jan Petersen, Hans Fróði Hansen, Jan C. Dam, Jákup Eli Olsen – Arnold Joensen, Fróði Benjaminsen, Jann Ingi Petersen, Øssur Hansen – Súni Fríði Johannesen, Mortan Hansen.




gult25 cyan25 magenta25 svart25



# Kvinnulandsliðið úttikið til stór krøv

**Niclas Joensen, landsliðsvenjari, hevur nú úttikið føroyska kvinnulandsliði í flogbólti, sum skal umboða Føroyar á Oyggjaleikunum á Isle of Man í summar**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR
*Tíðindaskriv*



*Føroysku flogbóltskvinnurnar hava nakað at liva upp til, eftir at tær á seinastu oyggjaleikum vunnu gullmerkini*

Úrslitið av úttøkini gjørdist hetta, eftir seinastu venjingina, sum var um vikuskiftið í Havn, tá liðið vandi 7,5 tíma saman.

**ÍF**
Helen á Lakjuni, miðleikari

**Dráttur**
Helga Nordendal, miðleikari/diagonalur (ársins leikari 2001)
Gerda Nattestad, kantur

**Mjølnir**
Tina Jacobsen, miðleikari/-kantur (ársins miðleikari 2001)
Marjun Kalsø, hevari (ársins hevari 2001)
Anna Jacobsen, diagonalur
Margit Joensen, libero/-kantur (ársins móttøku leikari 2001)

**Fleyr**
Mariann Øster, hevari

**Fredriksberg Volley**
Hjørdis Mortensen, miðleikari/kantur
Annika Joensen. miðleikari
Alvilda Ólavsdóttir, kantur

**Fortuna Odense**
Gudrid Nolsøe, kantur

### Gull-liðið

Tað eru stór krøv til hetta liðið, tí á seinastu Oyggjaleikunum á Gotlandi vann liðið Gull, eftir eina sera vælleikta finalu ímóti Álandi.

Harafturat hevði liðið eisini vunnið á sterka liðnum hjá Saarema í semifinaluni, og tað var fyrstu ferð, at nakað lið hevði vunnið á hesum liðnum á Oyggjaleikinum.

Um samanborið verður við liðið sum leikti á Gotlandi fyri tveimum árum síðani, so eru 9 av leikarunum, sum eisini vóru við til at vinna Føroyum gullið, og sostatt eru bert 3 nýggir leikarar á liðnum. Teir eru Helga Nordendal, sum í ár var vald til ársins leikara, Mariann Øster og Anna Jacobsen.

### Á venjingarlegu í Danmark

Fyri 14 døgum síðani var partur av liðnum á venjingarlegu í Danmark, har vant var saman við teimum leikarunum, sum dagliga leika í bestu donsku deildini, vanlig nevnd elitudeildini.

Á hesum túrinum var leiktur ein dystur ímóti elitu-liðnum hjá Fredriksberg Volley, og tað eydnaðist føroyska liðnum at vinna dystin 3-0, vuið settúrslitunum 27-25, 26-24 og 25-23.

### Nógv venjing

Annars hevur liðið verið saman næstan hvørt vikuskifti síðani at landskappingin endaði. Og fyri framman er ein long venjingarætlan, sum umfatar umleið 65 tímar í venjingarhøllini. Um tað verður møguligt at venja saman við teimum leikarunum sum eru í Danmark enn einaferð, er ein fíggjarligur spurningur, men landsliðsarbeiði er altíð ein fíggjarligur spurningur, tí hetta arbeiði krevur nógvan pening um úrslit skulu røkkast. Og hetta liðið hevur møguleikar at røkka gullinum, um leikararnir leggja alla orku í venjingina hesar seinastu tveir mánaðirnar.

### Stór kapping

Stór kapping hevur verið um tey einstøku plássini á liðnum. Byrjað var upprunaliga við 33 leikarum, og nú liðið var úttikið, var hetta í kapping millum 23 leikarar, meðan tað bert er gjørligt at hava 12 við á liðnum.

Hetta at stór kapping hevur verið ímillum leikararnar hevur gjørt, at leikarnir hava verið í góðari venjing, tá hugsa verður um, at tað eru 2 mánaðir síðani at kappingin endaði.

### Juanna S. Joensen skaða

Ein av leikarunum sum ein saknar á liðnum frá seinastu Oyggjaleikunum, og sum dagliga leikar í Danmark, er Juanna S. Joensen, sum fyrr hevur leikt við TB. Men vegna skaða er hon ikki við á liðnum tíanverri, tí hon hevði uttan iva kunna styrk um liðið við sínum royndum í bestu deildini í donsku kappingini.

Liðið er aftur saman til venjing fríggjadagin, tá tey venja saman íalt 4,5 tímar.

Tað er Føroya Sparikassi, sum er høvuðsstuðul hjá liðnum.

Sumba-ÍF 0-4 (0-3):

# ÍF gjørdi bart

**Fulgfirðingar fingu fyrsta sigurin á árinum, tá teir vunnu við fýra málum í Sumba**

2. DEILD
*Eyðun Klakstein*

Fulgfirðingar avgjørdu dystin ímóti Sumba longu í fyrra hálvleiki, og hóast heimaliðið menti seg í seinna hálvleiki, komu teir ongantíð rættiliga afturíaftur.

ÍF var undan kappingarbyrjan roknað sum favorittur til uppflytaraplássið í 2. deild, men eftir vánalig úrslit tveir teir fyrstu dystirnar var nakað av glansinum farin av liðnum. Við rygginum ímóti múrinum kláraðu fulgfirðingar tó at sláa frá sær hesaferð.

Fyrru trý korterini í dystinum ímóti Sumba skoraði ÍF tríggjar ferðir, og tað tryggjaði teimum góða sigurin.

Fyrsta málið í dystinum syrgdu teir á heimaliðnum sjálvir fyri. Ein langur bóltur varð sendur fram í brotsteigin hjá Sumba. Høgni á Lakjuni royndi at sleppa fram at, men endin var, at Marlon Kjærbo stútaði bóltin upp um sín egna málverja og í málið.

Málið til 2-0 tóku fuglfirðingar sær av. Eitt gott uppspæl í síðuni endaði við, at bólturin varð sendur inn fyri málið, har Jan Jørgensen setti fótin á.

Uppspælið til triðja málið hjá ÍF var í sama stíli, men hesaferð var tað Eyðolvur Petersen, sum hevði seinasta fótin á.

### ÍF einaferð afturat

Fyrra hálvleiki hevði ÍF greiða yvirvág í spæli, men í seinna hálvleiki menti heimaliðið seg. Sumba var tá aftanfyri 3-0, og hóast teir fingu fleiri málmøguleikar í seinna hálvleiki, eydnaðist teimum ikki at skora.

ÍF hevði eisini málmøguleikar, og einu ferðina eydnaðist teimum at gera mál. Sumba legði stóra orku í at trýsta frammi á vøllinum, og so var plássið gott, tá ÍF fór í mótálop. Jan Jørgensen fekk ein sending tvørtur um vøllin, og hann avgreiddi í málið við góðum skoti.

Við sigrinum á Sumba legði ÍF upp í kappingina um at flyta upp úr 2. deild, og hóast fleiri lið eru frammanfyri ÍF í løtuni, kann roknast við, at fuglfirðingar nú fara at seta størri ferð á. Men til tað krevst, at teir taka hvønn einasta dysti í eins stórum álvara, sum tá teir stóðu fyri fleiri góðum avrikum í steypakappingini.

**Sumba-ÍF 0-4 (0-3)**
0-1: Sjálvmál
0-2: Jan Jørgensen
0-3: Eyðolvur Petersen
0-4: Jan Jørgensen

# Býttu stigini

**HB og Skála spældu javnleik í Gundadali, og serliga munnu havnarmenninir vera fegnir um stigið**

2. DEILD
*Jákup Mørk*



*Her er HB álopi, men fyri tað mesta var tað Skála, sum trýsti á HB-málið leygardagin*

Tá Skála undanfarnu árini hevur verið í aðru deild, hevur tað aloftast verið í leiklutinum sum elevatorlið, men í ár tykjast skálamenn veruliga at ætla okkurt annað og meira. Byrjanin upp á kappingarárið hevur í øllum førum verið flúgvandi, og leygardagin gekk leiðin so til Havnar, har HB tók ímóti.

### HB vísti tenn

HB gjørdi ein vørr í fyrsta umfarinum av landskappingini, tá teir á heimavølli bastu ÍF, og tað var eisini líkt til, at teir aftur skuldu gera ein vørr, nú oddaliðið av Skála vitjaði. HB legði bragdliga fyri, og eftir eitt korter, hevði heimaliðið eisini lagt seg framum. Bárður Mortansson, sum hevur verið úti við skaða, varð spældur leysur innan fyri skálaverjuna, og hann spældi Eyðun Samuelsen púra leysan, so hesin hevði lætt við at skora.

Leiðslan hjá HB vardi tó ikki leingi. Smáar tíggju minuttir seinni hevði Pauli Hansen javnað fyri Skala, og so var aftur púra opið. Talan var um eitt sera vakurt mál, tá hann fyrst tók bóltin niður bringuni, áðrenn hann langaði bóltin í meskarnar.

### Kaj Leo í essinum

Tað skuldi vísa seg, at fleiri mál komu ikki í dystinum, men tað var so ikki, tí at møguleikararnir ikki vóru til tess. Hinvegin var størsti trupulleiki teirra, at Kaj Leo Johannesen nú er í málinum hjá HB. Líka mikið hvørjar snildir skálamenn royndu at nýta, so megnaði Kaj Leo at verja fyri, og HB'leikararrnir mundu draga andan heldur lættari, tá dómarin bríkslaði fyri seinastu ferð.

**HB-Skála 1-1 (1-1)**
1-0: Eyðun Samuelsen
1-1: Pauli Hansen